# Dimmalætting

6 kr.

NR. 134 TÝSDAGUR 19. NOVEMBER 1991. 114. ÁRGANGUR


*Studentaskúlin í Hoydølum fer at byggja*

# Nútímans køk og kantinu við plássi til 160 fólk

## Meðan umbyggingin fer fram komandi skúlaár, verður neyðugt at lata kostdeildina aftur umframt, at skúlin missir 5 skúlastovur í byggitíðini

Komandi summar er ætlanin at umbyggja og nýmótansgera alla niðastu hæddina í gamla bygninginum - tað er køkurin og matstovan á Studentaskúlanum í Hoydølum. - Á fíggjarlógini eru avsettar 2 mió. krónur til umbyggingar á studentaskúlanum.



Hølisviðurskiftini hava ikki verið í lagi seinastu 10 árini á Studentaskúlanum í Hoydølum

Snorri Fjalsbak, rektari sigur, at køkurin er í so vánaligum standi, at okkurt má gerast við hann nú.

Tá ið umbyggingin í køkinum og matarsalinum er liðug ber til at loysa aðrar trupulleikar aftan á t.d. bókasavnið.

**Óbrúkiligur í byggitíðini**

Verður farið í gongd við umbyggingararbeiðið komandi summar, verður einki arbeiði til arbeiðsfólkið í køkinum í byggitíðini.

Harafturat verður restin av tí gamla bygninginum óbrúkiligur av tí, at einki vatn verður, og eingin frárenning verður í lagi. - Tað merkir, at umframt kostdeildin verður afturlatin hesa tíðina, missir skúlin 5 skúlastovur.

Rektarin sigur, at tað ber illa til hjá honum at meta um, hvussu langa tíð umbyggingin fer at taka, men minst einum hálvum ári roknar hann við.

Tað kann lættliga fara at taka longri tíð at umbyggja ein slíkan gamlan bygning, enn tað er at byggja nýtt.

Eftir tekningunum, sigur rektarin, verður tað til ein nútímans køk við eini kantinu við plássi til 160 fólk at sita í.

**Fleiri næmingar**

Annars sigur Snorri Fjallsbak, at tað gongur upp á pumpurnar, sum tað hevur gingið í nógv ár.

Øll hølini í skúlanum verða brúkt alla tíðina. - Kemi og fysikhøli verða brúkt til alt møguligt annað t.d. danskt og føroyskt tímar o.s.fr.

Í ár eru umleið 50 næmingar fleiri enn seinasta skúlaár. - Í tí eina flokkinum eru 26 næmingar, í øllum hinum eru 24.

Fyri at sleppa inn í studentaskúlan krevst, at næmingurin er váttaður at vera egnaður av skúlanum, har hann hevur gingið áðrenn. - Teir næmingar sum »kanska« eru egnaðir fara til eina upptøkuroynd.

At enda sigur Snorri, at grundin til, at tað gongur framvegis, er, at lærararnir á skúlanum grenja alt ov lítið, - viðurskiftini hava verið ófullnøgandi seinastu 10 árini.

S

*Milliónarvirðir:*

# Alt syndrast

## Umframt at Pf. Albert Mortensen er farið av knóranum, er túrurin komin til Pf. Island Brokers, sum Albert Mortensen, stjóri og skipsmeklari, eisini er stórur partaeigari í

Føroya Skiftirættur hevur tikið eitt felag, sum eitur Pf. Island Brokers til viðgerðar eftir, at felagið er farið av knóranum.

Hetta er gjørt eftir áheitan frá fyritøkum og serliga peningastovnum, sum eiga pening í partafelagnum.

Pf. Island Brokers er partafelag, ið er heimahoyrandi á Argjum og ein av høvuðspartaeigarunum er Albert Mortensen, stjóri og skipsmeklari.

Sum fyribilsstjóri fyri partafelagnum er Jógvan Páll Lassen, advokatur, settur, og kemur málið fyrstu ferð fyri í Skiftirættinum hósdagin í næstu viku.

Herfyri fór Pf. Albert Mortensen, sum eigur stóra bygningin Albert Hall á Argjum, í sjálvbodna insolventa likvidatión. Í tí førinum er Christian Andreassen, advokatur, settur sum avtøkustjóri.

Bygningurin er seks ára gamal, og verður fyri størsta partin leigaður út. Í løtuni er talan um 21 leigumál.

B.


P/F GRANNSKOÐARASTOVAN
PAULI ELLEFSEN
STATSAUT. REVISOR

STARAVEGUR 17
BOX 3258 · FR-110 TÓRSHAVN
TLF.: (009 298) 1 4944
TELEFAX: (009 298) 1 6307

KPMG

Nýtt oljufýr



Ring 11133

STATOIL




# Oljufelag selur norska alifiskin

## Kemur at geva betri prís til alararnar

Eftir at FOS, Fiskeoppdretternes Salgslag, í Noregi er farið á húsagang, fara norska bankasamtøkan og Kreditkassen at stovna eitt felag við tí endamáli at fáa selt goymsluna av frystum alifiski á ein forsvarligan hátt og undir eftirliti.

Norska alifóðurfelagið T. Skretting/BP sigur í tíðindaskrivi, at eftir áheitan frá Norske Fiskeoppdretteres Forening og FOS gjørdi T. Skretting í samstarvi við eigara sín BP (British Petroleum, blaðm.) upprunaliga eina avtalu um at standa fyri sølu av allari frystigoymsluni til marknaðir uttan fyri EF. Avtalan gjørdi tað møguligt at gera nýtslu av øllum altjóða handilsviðskiftanetinum hjá BP fyri at sleppa av við fiskin á ein handilsliga forsvarligan hátt og til best møguligan prís.

Norsk Fiskeopdretteres Forening og nakrir av teimum, sum eru við í hesi vinnu hava eftir húsagangin í FOS biðið T. Skretting/BP um at halda fram við avtaluni um sølu av frysta laksinum, soleiðis at nú kann tryggjast tann heilt neyðugi friðurin um hetta nógv umrødda mál. Hetta fer at gera sítt til ein prísvøkstur á laksi hjá alarunum, bæði í Noregi og Europa annars.

T. Skretting/BP hevur játtað at átaka sær søluábyrgdina fyri alt, sum er á goymslu. Treytin er, at hetta fer fram í tøttum samarbeiði við limirnar í Norges Ferskfiskomsetnings Landsforening og NFF.

Farið er nú undir at orða eina avtalu millum T. Skretting/BP og nýggja felagið, og tað týdningarmesta við avtaluni er:

- at sølan av frysta laksinum verður fyrisitin av einum stórum og álitandi felag við neyðugu orkuni til at greiða uppgávuna.
- at nú er tryggjað, at óseldi laksurin á frystigoymslu hvørvur frá marknaðinum í EF-londunum og ikki longur er við til at trýsta niður laksaprísin á størsta útflutningsmarknaði Noregs.

Sølan fer fram í samsvari við handilspolitisku avmarkingarnar, sum nú eru niðurfeldar í avtaluni millum bankarnar og norska statin. T. Skretting/BP Nutrition fer upp í hetta tiltak fyri at tryggja eina lønandi alivinnu, sum aftur skapar grundarlag fyri vøkstri í eini týðandi bygdamenningarvinnu, verður sagt í tíðindaskrivinum frá T. Skretting/BP. ▲

*Retræteforberedelser?*

DER var ikke gået mange uger, efter at Socialdemokratiet og Folkeflokken havde dannet landsstyre i januar måned, førend man kunne mærke en vis socialdemokratisk undertone i retning af at ville slippe bort fra ansvaret for landets ledelse, som partiet ikke kunne undgå efter valgsejren sidste efterår. Hvor meget der har været om dette, eller om en eventuel retræte fortsat er på forberedelsesstadiet, er ikke rigtig kommet frem; men faktum er, at landsstyresamarbejdet mellem disse to partier stadig holder, hvad enten det skyldes Folkeflokkens fastnagling af Socialdemokratiet til at bistå ved oprydning af det økonomiske kaos, som partiet efterlod det færøske samfund i efter den famøse landsstyreperiode i årene fra 1985 til 1988, og som Folkeflokken sammen med Sambandspartiet og Det republikanske parti var gået i gang med for godt to år siden, men ikke fik fuldført, fordi landsstyresamarbejdet blev afbrudt midt i valgperioden, eller det måske skyldes noget helt andet.

Der har været enkelte lejligheder for Socialdemokratiet til at sætte sager på spidsen og derved lade det komme til et enten-eller i samarbejdet med sin landsstyrepartner. Bl.a. har formanden for fiskernes fagforening gang på gang henvist til og protesteret mod den fiskerfjendtlige politik, som er blevet ført siden landsstyredannelsen i begyndelsen af året, og der er direkte blevet appelleret til Socialdemokratiet og spurgt, hvor længe partiet vil være med til at støtte den førte fiskeripolitik, der bliver varetaget af en af Folkeflokkens landsstyremedlemmer.

Socialdemokratiet har åbenbart ikke regnet dette for særlig magtpåliggende, eftersom ønsker fra fiskernes repræsentanter ikke har mødt særlig velvilje fra landsstyrets side hidtil.

Netop i disse dage er der dukket endnu et moment op, som måske kan give utilfredse socialdemokrater lejlighed til at smøge sig ud af det belastende landsstyresamarbejde med Folkeflokken og derved fra ansvaret for at opretholde eller helst skærpe de foranstaltninger og restriktioner, som allerede er iværksat for at imødegå konsekvenserne af deres egne økonomiske fejlgreb fra sidst de havde landsstyreledelsen. Det er gennemførelsen af planerne om den undersøiske tunnel, der igen er blevet aktuel efter at et norsk firma er kommet med tilbud, som med den kunstige pengerigelighed under Socialdemokratiets landsstyreledelse i firserne in mente ikke umiddelbart virker særlig afskrækkende, men som, efter at de økonomiske tømmermænd har gjort sig gældende, har fået selv socialdemokratiske partispidser til at melde pas.

Spørgsmålet er så, om det kommer til brud, eller om det lykkes lagmanden at få sine partifæller at makke ret og holde sig i deres politiske skind, indtil det er lykkedes for ham - ved Folkeflokkens hjælp - at få iværksat den bebudede selvstyrelov til afløsning af Hjemmestyreloven, hvilket synes at få større prioritering end forsøg på at bringe økonomien på fode igen.

*Eysturskúlin:*

# Ikki vist, um tað er lógligt at selja skúlan

## Skúlaráðið er ímóti ætlanini hjá Tórshavnar Býráð at selja Eysturskúlan

Fleiri enn 500 foreldur og avvarðandi vóru møtt á fundinum, sum varð hildin á Eysturskúlanum seinasta mikukvøld. Tey, ið vóru boðin við á fundin at greiða frá støðuni, vóru: Poul Michelsen, býráðsformaður, Marita Petersen, landsstýrismaður í skúlamálum, Heðin Mortensen, formaður fyri Tórshavnar Mentamálanevnd, Jóhs. Álvheygg, formaður fyri Tórshavnar skúlaráð, og Hensar Ellingsgaard, landsskúlastjóri.

Nevndin hevði fund leygardagin 16. og er komin til hesa niðurstøðu, sum hon ber víðari í einum tíðindaskrivi til almenningin:

Einki avgerandi ella nágreiniligt kundi upplýsast um, hvat hendir við málinum víðari. Kanningar og samráðingar fara framvegis fram millum Tórshavnar Kommunu og Føroya Landsstýri, uttan at nakað ítøkiligt kundi sigast um, hvør ætlanin er, antin at selja, selja lutvíst, leiga ella, hvør skuldi leiga frá hvørjum.



Frá politiskari síðu varð upplýst, at ætlanin gongur út uppá at selja skúlan, um ikki heilt, so tó partvíst út frá tí sjónarmiði, at grundskúlin, ið umfatar 1. til og við 7. fl., skal varðveitast.

Framhaldsskúlin frá 8. til og við 10. fl. skal niðurleggjast, hetta tó yvir eitt ávíst áramál, har ætlanin er, at tey, ið ganga nú í framhaldsdeildini, kunnu gera sína skúlagongd liðna. Rættiliga óvíst er tó, um hetta letur seg gera, og sjónarmiðini gingu mest uppá, at framhaldsdeildin skuldi niðurleggjast á Eysturskúlanum skjótast gjørligt.

Hetta merkir fyri okkum, at Eysturskúlin verður niðurlagdur sum fólkaskúli, tí fólkaskúlin er ein 7 ára grundskúli og ein 2 ára framhaldsskúli, og eingin møguleiki verður at halda fram í 10. flokki.

Skúlabørn í umdømi Eysturskúlans, ið ganga ella skulu ganga í framhaldsdeildina, verða flutt í aðrar skúlar, og gevur hetta tá pláss fyri øðrum virki á skúlanum. Við missinum av framhaldsdeildini missa vit samstundis øll serhøli, sum verða nýtt til evnafrøði, træsmíð, køk v.m.

Skúlaráðið fastheldur um skúlan í verandi líki og er ímóti, at skúlin verður seldur heilt ella lutvíst.

Landsskúlafyrisitingin vil nágreiniliga fylgja við gongdini í málinum og setir stórt spurnartekin við, um tað í heila tikið er lógligt at selja skúlan. Herumframt skulu fleiri treytir í fólkaskúlalógini haldast og takast við í teimum víðari metingunum í málinum.

Nevndin fer at fylgja væl við í málinum, og hon er ímóti, at nøkur broyting fer fram, ið ger umstøður næminganna verri enn tær eru.


**SUÐUROYINGAR**

Suðuroyar Sambandsfelag bjóðar øllum sambandsáhugaðum til politiskt orðaskifti á Gistingarhúsinum í Øravík friggjadagin tann 22. nov. 1991 kl. 19. Við á fundinum vera Edmund Joensen, Finnbogi Arge, Lisbeth Petersen og Flemming Mikkelsen, løgtingslimir.

Skrá: E.F. og handilssáttmálin
Fíggjarstøðan
Sambandspolitikkur nú og frameftir
Ymist

**Suðuroyar Sambandsfelag**
**NEVNDIN**